miðvikan
Nr. 201 • 21. oktober 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

# Sjóvanlukkan við »Riddaranum«

**Ein av teimum kenslubornu løtunum á ferðini við Norrønu til Íslands seinast í september var á kirkjugarðinum á Seyðisfirði, tá luttakararnir mintust teir sjey menninar av Riddaranum, sum umkomust í 1927**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Av hesum sjey monnunum eru fimm teirra jarðaðir her. Minningarhaldið var 30. september, júst 82 ára dagin fyri, at líkini komu til Seyðisfjarðar at verða jarðað.

Greitt er longu frá hesum hátíðarhaldi í Sosialinum. Her skal henda syrgiliga søgan lýsast í síni heild grundað á frásagnir, sum í 2002 og 2003 vóru í FF-blaðnum

Tann mest útgreinaða frásøgnin stóð í íslendska blaðnum Sjón & Saga í 1963. Hjalmar Waag Høgnesen í Klaksvík gjørdi FF-blaðnum tann beina at týða greinina til til føroyskt. Her verður sagt:

Føroyingar hava gjøgnum langar tíðir søkt fiskimið Íslands.
At byrja við var tað mest við deyðsiglarum, har vindurin jú var avgerandi fyri ferðini.

Seinni fingu teir hjálpimotor, so nú vóru seglini ikki einasta álit eins og áður. Hesar sluppirnar byrjaðu á íslandsmiðum beint fyri aldamótið. Sluppirnar vóru fyri tað mesta úr Onglandi, men nakað seinni vóru nakrar keyptar úr Íslandi.

## Riddarin

Ein av teimum, ið leingi hevði roynt við Ísland, var "Riddarin" úr Trongisvági, sum var merkt TG 308. Hon var smíðað úr eik í Plymouth í Onglandi umleið 1885 og var 90 bruttotons. Hon var deyðsiglari til 1927, men tá fekk hon ein 60 hesta Tuxham motor. Skipið var keypt stutt eftir aldamótið av partafelagnum J. Mortensen. Hendan fyritøkan átti 12 aðrar sluppir, og høvdu nakrar av teimum hjálpimotor. Í 1935 seldi J. Mortensen "Riddaran" út á Toftir. Síðan varð hon seld til Miðvágs, bleiv umbygd og fekk aðra maskinu, sum mangar tá í tíðini, og kundi hon tá sigla við 10 míla ferð. "Riddarin" er enn (tá) í Vágum. Riddarin endaði sínar dagar hjá Símun Johansen av Strondum.

Riddarin var eitt sera gott sjóskip. Eins og so nógvar aðrar sluppir var "Riddarin" á fiskiveiði á Eysturlandinum í 1927. Tað hevði gingið væl, og fiskaríið var so nøkurlunda. "Riddarin" tók umleið 350 skippund (á 160 kg, 56 tons) av saltfiski. Til hendan fisk brúktu teir umleið 45 t. av salti, sum teir høvdu við úr Føroyum.

Hetta var triði túrur hjá teimum hetta árið. Tann fyrsta vóru teir mest á Suðurlandinum og vestur í Jøkuldýpið. Næsti túrur var frá 12. juni og juli út. Tá varð mest fiskað á Vesturlandinum og Norðlandinum.

## Menn høvdu ikki hug at fara avstað aftur

Stutt eftir heimkomu av næsta túri var farið at hugsa um Eysturlandstúrin. Nakrir av monnunum, sum høvdu verið við hinar báðar túrirnar, løgdu ikki í at fara hendan seinasta túrin. Tað var so nógv heima, sum bíðaði, sum hoygging og kríatúr, sum teir máttu taka sær av. Tessvegna kom at vænta fólk hendan túrin. Ikki gekk so væl at fáa manning til túrin, men blivu teir tó fullmannaðir til endan. Skiparin á "Riddaranum var Mortan Nielsen, maður um 40 ára aldur úr Sumba. Har búðu umleið 400 fólk tá, í dag umleið 475.

Skiparin Mortan átti son, sum æt Johan, sum hevði siglt úti í trý ár og hevði siglt næstan øll heimshøv. Pápin vildi hava hann við hendan túrin. Men sonurin var trekur, tí hann ætlaði sær á stýrimansskúla í Danmark sama heyst. At enda slakaði hann og játtaði at koma við.

Skipið varð nú gjørt klárt til Íslandstúrin, og ætlanin var sum sagt at fara á Eysturlandið og Norðlandið. Síðan var farið av Trongisvági og vestur móti Lítlu Dímun. Ferðin gekk væl, og tað var av besta veðri alla tíðina.

## Gott samband við bøndurnar

Bøndurnir við Eystfirðirnar kendu væl skiparan Mortan. Hann var mangan komin har á land og



*Odmar Hansen hevur lagt krans á grøvina hjá teimum, sum fórust við Riddaranum. Kona Odmar er abbadóttir skiparan Mortan. Á myndini er eisini presturin Cecil Haraldson*



*Jákup Mikal Mikkelsen av Toftum lesur Faðirvár við grøvina. Tað gjørdi hann eisini í 1999 í fjøruni nærindis Grindavík, tá minningarhald var hildið um teir, sum doyðu við Onnu í 1924. Pápi Jákup Mikal var ein teirra*

keypti seyð øll tey 20 árini, hann hevði verið skipari á sluppunum.

Hann hevði nú á orðið um at fara upp til Fagranes næsta vikuskifti at keypa seyð, sum hann var vanur. Fagranes var nakað innarlaga á Langanesi Bakkaflóðarmegin. Seyður var ofta goldin við koli og salti ella aðrari vøru, men ongantíð við peningi. Hildið var, at onnur vøra var best at gjalda við. Føroyingar guldu heldur aldri við brennivíni. Tað var heldur ikki at finna umborð, uttan í medisinkistuni til heilivág. Har vóru so altíð tvær fløskur umborð á hvørjari slupp. (Tað er hugaligt at hava fingið slíkt ummæli øðrum enn føroyingum sjálvum.)

Hildið varð áfram at fiska nakrar dagar, og hendi einki stórvegis ta tíðina. Um vikuskiftið varð siglt inn á Fagranes fyri at fara á land til umrøddu ørindi. Róð varð í land í tí stóra skipsbátinum